

Gorm-oljuboripallurin. Mynd: EPA/AP MOLLER-MAERSK

# Olja tryggjar at danski útflutningurin ikki minkar

**Jógvan Hugo Gardar**

09.09.2014 - 13:17

Oljan.fo

Olja syrgdu fyri at danski útflutningurin vaks í juli, tí uttan oljuna var talan um eina afturgongd. Hetta vísa tøl fra donsku hagstovuni.

Útflutningurin vaks við 2,7 prosentum í juli, men taka vit oljuna burturúr tølunum, so var talan um eina afturgongd uppá 0,2 prosent í juli.

Um ein hyggur eftir tølunum fyri seinastu tríggjar mánaðirnar, so er talan um eina afturgongd uppá 1,3 prosent, og sambært Ritzau er orsøkin at sølan av maskinum og maskinlutum fall. Serliga er talan um eina afturgongd í søluni av eykalutum til vindmyllur í Belgia og Stórabretlandi.

Hjá Dansk Erhverv dáma tey einki afrurgongdina í útflutninginum í summar.

- Tað er gott at síggja framgongdina í juli fyri seg, men tað er alt annað enn gott at talan er um eina afturgongd samanlagt seinastu tríggjar mánaðirnar. Eisini er tað keðiligt at síggja at talan bert er um olju sum megnar at økja um útflutningin,sigur Mira Lie Nielsen, iå er búskaparfrøðingur hjá Dansk Erhverv, sambært Ritzau.

Hon leggur afturat at tað hevur stóran týdning fyri Danmark at útheimurin keypir danskar vørur.

Men meðan útflurningurin samanlagt minkar, so eru jalig tøl ímillum. Útflutningurin til Brik-londini er í vøkstri. Brik-londini eru Brasil, Russland, India og Kina. Til hesi londini vaks útflurningurin við 10,8 prosentum farnu tríggjar mánaðirnar. Her er serliga talan um vøkstur í útflutninginum til Brasil og Kina.

Enn sæst ikki aftur í hagtølunum hvussu russiski handilsstongsilin rakar ES og Danmark.